## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag, fríggjadagin og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi, mánadagin upp í frískan vind. Sunnudagin kanska okkurt ælið, annars turt og sólglottar. Hitin millum 16 og 20 stig.

# Klaverbókin hjá Stamen

**Fyrsta føroyska klaverbókin er komin. Tað eru Bjarni Restorff og Stamen Stantchev, ið hava staðið fyri bókini, ið er bæði til royndar og óroyndar klaverleikarar**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*




Tað er langt ímillum bøkur við føroyskum undirvísingartilfari innan tónleik. Nú er fyrsta føroyska klaverbókin komin. Hetta er bókaslag, ið eisini verður nevnt klaverskúli.

Føroyskir næmingar hava nýtt klaverskúlar við útlendskum sangum, men nú er bøtt um hetta, og ein kann læra seg klaver við føroyskum sangum og norðurlendskum sangum, ið føroyingar hava tikið til sín.

Bókin hevur heitið »Klaverbókin hjá Stamen«. Bjarni Restorff og Stamen Stantchev standa aftanfyri bókina. Stamen er tónleikalærari í Havn og hann hevur skrivað bókina. Dóttir hansara Rannvá, hevur teknað permumyndina.

15 sangir eru. Byrjanin er løtt, men so gerst tilfarið eitt sindur torførari, sum blaðað verður í bókini. Soleiðis er tilfar til bæði nýbyrjarar og royndar leikarar.

Klaverbókin hjá Stamen ger tað nú møguligt at læra seg at leika klaver á føroyskum grundarlag. Tilfarið, sangirnir, eru føroyskir og norðurlendskir, ið føroyingar hava tikið til sín. Og slíkt hevur ikki verið tókt í føroyskari bók áður.

Í bókini eru sjálvsagt nótar, men eisini er orðalisti, orðafrágreiðingar,har greitt verður frá hugtøkum innan tónleik. Og har er alt, ið vert er at vita. Alt frá a tempo, ið merkir uppaftur í ferð, til prima volta og secunda volta, ið merkir fyrsta vending og onnur vending.

Bókin er til skrivað til føroysk børn »í øllum aldri«. Bjarni Restorff gevur út og bókin fæst kring alt landið.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 23 |
| Halifax | 21 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 14 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 23 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 22 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 26 |
| Helsinki | 26 |
| Moskva | 28 |
| Berlin | 31 |
| Warzawa | 29 |
| Kiev | 30 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 30 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 33 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | – |
| Sydney | 16 |
| New York | 31 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1006 hPa yvir Suður-Onglandi fer spakuliga vestureftir og brúgvalagið haðani til havið eystanfyri Føroyar hvørvur sum frálíður.




Eitt hátrýst, 1029 hPa eystanfyri Ísland stendur mestsum í stað og gevur góðveður á okkara leiðum komandi dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/07 kl. 06⁰⁰– 31/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,4°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 30/07 kl. 06⁰⁰– 31/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 31,2 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

30. juli: Mánin longst frá jørðini
1. aug.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. aug | 01.00 | 13.31 | 00.00 | 12.31 | 00.15 | 12.46 | 03.00 | 15.31 | 04.00 | 16.31 | 11.46 | — | 10.46 | 23.18 | 01.15 | 13.46 | 02.15 | 14.46 | 00.45 | 13.16 | 02.00 | 14.31 |
| 2. aug | 02.03 | 14.36 | 01.03 | 13.36 | 01.18 | 13.51 | 04.03 | 16.36 | 05.03 | 17.36 | 00.18 | 12.51 | 11.51 | — | 02.18 | 14.51 | 03.18 | 15.51 | 01.48 | 14.21 | 03.03 | 15.36 |
| 3. aug | 02.56 | 15.17 | 01.56 | 14.17 | 02.11 | 14.32 | 04.56 | 17.17 | 05.56 | 18.17 | 01.11 | 13.32 | 00.11 | 12.32 | 03.11 | 15.32 | 04.11 | 16.32 | 02.41 | 15.02 | 03.56 | 16.17 |
| 4. aug | 03.39 | 16.01 | 02.39 | 15.01 | 02.54 | 15.16 | 05.39 | 18.01 | 06.39 | 19.01 | 01.54 | 14.16 | 00.54 | 13.16 | 03.54 | 16.16 | 04.54 | 17.16 | 03.24 | 15.46 | 04.39 | 17.01 |

5 707265 100043 >